Skytte sendur av Svangaskarði

Ingolf Petersen og Kjartan Nesá skulu royna at rætta B68 skútuna uppaftur, eftir at hon síðani summarsteðgin er komin í alt tyngri sjógv

VENJARI
Jákup Mørk

Frank Skytte verður ikki við stýrisvølin hjá B68 seinastu tríggjar dystirnar. Ístaðin verða tað Ingolf Petersen og Kjartan Nesá, sum fara at standa við ábyrgdini restina av árinum

Seks dystir í landskappingini og tvey stig. Tap ímóti B36 og javnleikur ímóti TB á heimavølli, og á útivølli javnleikur ímóti EB/-Streymi og tap ímóti HB, KÍ og GÍ, Tað hevur verið úrtøkan hjá B68 síðani 7. juli, og nú hevur leiðslan í felagnum tikið avleiðingarnar.

Á heimasíðuni hjá Tofta Ítróttarfelag, b68.fo, varð mánakvøldið boðað frá, at Frank Skytte ikki longur er venjari hjá B68. Tá spælararnir møttu til venjingar mánakvøldið, fingu teir at vita, at í trimum teimum seinastu umførunum verða tað tveir av gomlu stuðulunum hjá B68, sum fara at hava ábyrgdinatað, sum er eftir av kappingarárinum.

Talan er um Ingolf Petersen og Kjartan Nesá, sum báðir hava verið venjarar í B68 í ár.

Niclas Davidsen er formaður í Tofta Ítróttarfelag. Hann staðfestir, at venjarin er frítikin fyri venjarauppgávuna, og at tað var ússaliga úrtøkan eftir summarsteðgin, sum bar við sær, at nevndin metti tað vera rætt at fremja broytingar:

– Allir partar í felagnum kunnu ivaleyst grípa í eginan barm, tá vit líta á tað farna. Tað gekk væl fyrrapartin av árinum. Tá vit í síðsta umfarinum undan summarsteðginum vóru í Gundadali og spældu ímóti HB, mistu vit møguleikan at vera oddalið. Síðani hevur gingið stútt skeiva vegin. Í sovornum førum verður ofta roynt við nýggjum venjara, og tað hava vit so gjørt av at royna.

Men tit kunnu ikki røkka bronsuplássinum og harvið altjóða luttøkuni, sum tit hava verið við í seinastu árini?

– Tað gera vit neyvan. Men støðan kendist so fastløst nú, at vit mettu tað at vera neyðugt við broytingum fyri at koma í gongd aftur, vinna onkran dystin og harvið at betra um lagið, áðrenn tað verður farið í vetrarfrí og seinni undir fyrireikingarnar til eitt nýtt kappingarár.

Eru tit misnøgdir við arbeiðið hjá venjaranum?

– Spælararnir og venjararnir hava arbeitt seriøst síðani fyrst í árinum. Nógv tíð og orka er lagd í venjingina. Vektin, sum tað verður vigað á, eru úrslitini. Tað er nú eina ferð soleiðis. Tað er eingin loyna, at vit vónaðu at vera við í kappingini um fremstu plássini í ár. Men tað hevur ikki gingið eftir vild, og eftir tapið í Gøtu og alt annað enn góða avrikið gjørdu vit av, at nú var neyðugt við broytingum, sigur Niclas Davidsen, formaður í Tofta Ítróttarfelag.

Ingolf Petersen og Kjartan Nesá vóru við á B68 liðnum, sum vann FM heitini í 1984, 1985 og aftur í 1992.Teir hava báðir tikið lut í venjaraskeiðum, sum FSF hevur skipað fyri. Í fjør var Ingolf Petersen hjálparvenjari hjá NSÍ í 1. deild, har Petur Mohr var venjari. Petur Mohr verður eftir øllum at døma venjari á Toftum komandi ár.

Í trimum teimum seinastu umførunum skal B68 spæla ímóti VB á heimavølli, NSÍ á útivølli og Skála á heimavølli.

Annar hvør venjari hevur mist høvdið

Í flestu førunum eru tað føroyskir venjarar, sum hava tikið við, tá útlendingar hava mist venjarastørvini

VENJARAR
Jóannes Hansen

Tað er eitt krevjandi starv at vera fótbóltsvenjari. Tað verður roknað við, at venjarin syrgir fyri, at venjingarstøðan er góð, at liðið verður sett saman, sum tað eigur, og at hugburðurin til uppgávurnar er optimalur. Øllum hesum hevur venjarin ábyrgdina av, og um úrslitini boða frá, at tað ikki er so væl vorðið, so er tað venjarin, sum fær sekkin.

Soleiðis er tað úti í stóru verð, og soleiðis er tað vorðið í Føroyum. Nú B68 venjarin er farin úr starvinum, hava helmingurin av teimum tíggju feløgunum í 1. deild skift venjaran út í hesum kappingarárinum, og í fleiri av hinum feløgunum hevur eisini verið turbolensur kring venjararnar.

Av teimum fimm venjarunum, sum eru sagdir úr starvi, hava fýra verið útlendingar. Burtursæð frá Marek Wierczbicki, sum í fótbóltshøpi kortini verður roknaður sum føroyingur og TB venjaran, so eru allir teir, sum hava tikið ábyrgdina á seg, føroyingar.

Fram ímóti summarsteðginum skiftu bæði feløgini í Suðuroy venjara. Dragan Kovacevic varð sendur til hús úr Vági, og Marek tók við. Zoran Mancic, sum hevði verið venjari á Tvøroyri síðani eftir fimta umfar í fjør, varð settur frá uppgávuni á Tvøroyri, har Lynge Nielsen gjørdist nýggjur ábyrgdarmaður.

Eftir HB tapið ímóti B36 í tólvta umfarinum varð Ion Geolgau uppsagdur. Kári Nielsen, sum hevði verið hjálparvenjari, og Jóannes Jakobsen tóku við sum venjarar. Felags fyri teir báðar er, at teir í nógv ár vóru á besta HB liðnum.

Eftir at Skála í 14. umfarinum hevði tapt stórt á heimavølli ímóti NSÍ, varð venjarin, Mathias Davidsen, uppsagdur. Í staðin varð Hans Jákup Andreasen settur sum venjari. Hann hevur áður vant bæði Skála og EB/Streym, umframt at hann hevur verið ungdómsvenjari í NSÍ. Hjálparvenjari hjá honum er Justinus Justinussen, sum árini frammanundan hevur tikið eina hond í við venjingini á Skála. Í síni tíð var Justinus á NSÍ liðnum, tá teir vóru í miðaldeildini og í 1976 og árini eftir, tá teir fyrstu ferð royndu seg í 1. deild.

Og eftir 15. leikumfar er tað B68, sum hevur skift venjaran út. Frank Skytte er farin frá, og tveir av gomlu B68 spælarunum, sum seinnu árini hava fingist við at venja, hava tikið við ábyrgdini.

Umframt í omanfyri nevndu fimm feløgum, so er greitt, at í hvussu so er trý av hinum feløgunum í bestu deildini skulu hava nýggjan venjara, áðrenn tað verður farið undir eitt nýtt kappingarár.

Trygve Mortensen verður ikki venjari í EB/Streymi komandi ár, Johan Nielsen verður ikki venjari í GÍ, og Piotr Krakowski, sum í summar fekk Oddbjørn Joensen at hjálpa sær við venjingini, verður ikki venjari hjá B36 næsta ár.

Í gjár varð upplýst frá leiðsluni í KÍ, at teir fegnir vilja hava, at Kurt Mørkøre heldur fram í venjarastarvinum, og at teir bíðaðu eftir, at avhildni venjarin fór at geva teimum boð um, hvussu tað verður hjá honum.

Jógvan Martin Olsen fer at halda fram í NSÍ. Og um Kurt Mørkøre ger av at halda fram í Klaksvík, so verða tað bara NSÍ og KÍ, sum fara at hava somu venjarar, tá tað verður farið undir komandi kappingarár, sum tey høvdu, tá tað varð farið undir fyrireikingarnar til hetta kappingarárið.

Tí kann ikki sigast annað, enn at tað er nógvur trekkur á venjarabonkunum kring landið. Júst sum tað er tað í útlondunum.

Frálæra í bridge

Eftir at eingin undirvísing var í bridge undanfarna veturin, fer Bridgefelagið í Havn nú aftur at geva frálæru í bridge

BRIDGE
Bogi Simonsen & Arnbjørn Sivertsen

Leggja til brots aftur

Bridgefeløgini í Havn hava síðan eina ferð í seksti árunum regluliga skipað fyri frálæru í bridge. Árið í fjør var eitt undantak, men komandi vetur rigga vit seglini til aftur, so øll fáa møguleika at kunna seg við hetta spennandi spælið. Kanska átti man heldur at sagt ítrótt, tí bridge er ein kappingargrein burturav. Hvør hoyrdi ikki tíðindini frá EM í Italia í summar?

Ítróttargrein við møguleikum

Bridge er avgjørt ein kappingargrein, har tey smáu londini eisini hava møguleika at gera seg galdandi. Í 1990 gjørdist Ísland heimsmeistari í bridge — eitt roysni, tey í grannalandi okkara minnast við stoltleika. Føroyar vóru fyri fyrstu ferð til EM í summar, og ætlanin er at halda fram við luttøku í altjóða kappingum, sum eru bæði fyri menn (opið rað), kvinnur, unglingar og veteranar.

Bridge er eisini um at verða viðurkent sum ítróttargrein til vetrar OL.

Eitt spæl fyri øll

Men bridge má fyrst og fremst metast sum eitt frítíðarítriv til at hugna um tey myrku vetrarkvøldini.

Øll kunnu spæla bridge. Ung, gomul, kvinnur og menn kunnu øll dystast á jøvnum føti. Tað finnast ikki nógvar ítróttargreinar, har tú hevur møguleika at spæla saman við unnusti tíni ella abba tínum.

Tilmelding

Bridgeskúlin er við í vetrarskránni hjá Tórshavnar kvøld- og ungdómsskúla sum frítíðarvirksemi. Frálæra og spæl fyri nýbyrjarar verður í Bridgehúsinum í Gundadali, gamla HB húsinum, hvørt mánakvøld í vetur millum klokkan 19 og 22. Lærari í vetur verður Arnbjørn Sivertsen. Vit byrja mánakvøldið 30. september.

Kostnaðurin fyri hvønn er einans 100 kr fyri allan veturin, umleið 15 kvøld tilsamans. Tilmelding er á skrivstovuni hjá Tórshavnar kvøld- og ungdómsskúla, tel 31 77 55, ella heima hjá Arnbjørn Sivertsen, tel 31 91 42.

Úti við rívuni

Bogi Simonsen og Arnbjørn Sivertsen, spøl frá EM

Í dystinum ímóti Pólandi (10-20) var Bogi í hesum spælinum úti við rívuni.

Nr.9

	K5 63 AKQ843 1086		
S/A			
AJ1092 Q J62 AJ32		876 AK109875 9 K9	
	Q43 J42 1075 Q754		

S	V	N	E
Rói Joensen	Adam Zmudzinski	Bogi Simonsen	Cezary Balicki
pass	1sp	1ut!	D
pass	pass	pass	

Eystan spældi hj K út, og so var einki at gera hjá mótspælinum. Hj K tók hj Q við sær, og hj J43 gjørdist hald í litinum. Bogi tók 7 stikk og kundi væl nøgdur skriva sær 180 inn.

Høvdu polakkarnir funnið tað rætta mótspælið við lágum hjartara út til frúnna og kleyvara aftur til kongin, høvdu teir tikið 11 stikk, og ævintýrið hjá Boga hevði tá í staðin kostað 1400.

»Gott at eg hevði hald í hjartara, makkarin«, helt Rói skemtandi fyri eftir spælið. Stuttligt tá sovorið eydnast.

Í hinum rúminum meldaðu og vunnu Hans Jacob og Arnbjørn við EV kortunum 4sp. 620 + 180 gav føroyska liðnum 13 imp ímóti pólsku heimsstjørnunum.

Favorittarnir høvdu trupulleikar

Allir dystirnir hjá kvinnunum endaðu við favoritt-sigrum, men í øllum trimum førum var tað ikki fyrr enn í seinna hálvleiki, at styrkismunurin kom til sjóndar á máltalvuni

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Næst seinasta umfarið í kvinnudeildini varð leikt um vikuskiftið, og úrslitini lagaðu seg soleiðis, at spenningurin í kappingini verður varðveittur til seinasta umfari. Í øllum førum spenningurin um silvurmerkini. Gullinum hevur KÍ langt síðani tikið sær av, og einasti spurningurin er nú, hvørt tær eisini megna at vinna tíggjuna dystin í endaspælinum, soleiðis at tær kunnu enda árið við fullum stigatali.

HB gjørdi mótstøðu

Í Havn spældi júst KÍ móti HB, og her var helst einki at ivast í, at níggjundi sigurin hjá KÍ í endaspælinum bíðaði. Tað gjørdist eisini endin, men áðrenn tær kundu staðfesta sigurin, mátti KÍ lata sær lynda ávísara frustratiónir, tí HB gjørdi alt tað, sum tær vóru mentar, til tess at steðga meistaraliðinum.

Tað var alla tíðina KÍ, sum trýsti, og tað var eisini fult uppiborið, tá Rannvá Andreasen legði tær á odda tíðliga í dystinum, men HB gavst ongantíð. Tær royndu at liggja framvið, og beint fyri steðgin eydnaðist Eyðfríð Kristiansen at javna, tá hon átti seinasta fótin eftir frísparksinnlegg.

Í seinna hálvleiki brast tó fyri nev hjá KÍ, og so gjørdu tær skjótt av, tá stigaposin skuldi surrast. Bert fáir minuttir vóru farnir, tá Rannvá Andreasen legði bóltin fyri føturnar á eini fullkomuliga leysari Malenu Josphsen, og stutta løtu seinni var Rannvá aftur upp á spæl, tá hon smekkaði frískpark beinleiðis í kassan, og so var alt avgjørt.

KÍ yvirvágin var stutt sagt alt ov stór, til at HB hevði møguleika at koma fyir seg aftur, og fram móti dystarenda staðfesti Rannvá Andreasen bæði sigurin og sítt egna heiti á máltindinum, tá hon sendi bóltin í netið til 4-1.

Silvurið kann røkkast

Í Gøtu skuldi B68 greiða setningin móti GÍ, men eins og hjá KÍ, so tók tað sína tíð at basa botnliðnum. Eftir ein fyrra hálvleik, har B68 hevði yvirvág, men kortini ikki skaptu teir stóru møguleikarnar, stóð framvegis á jøvnum, og í seinna hálvleiki helt sama dystargongdin fram. Ikki fyrr enn helmingurin av seinna hálvleiki var runnin, eydnaðist B68 at skora, tá Maibritt Olsen var fyrst á einum bólti, sum varð sendur inn um GÍ-verjuna, og sama støðan íkom nakað seinni, tá Maibritt aftur var á staðnum og avgjørdi dystin.

Fyri B68 merkir sigurin, at tær framvegis hava møguleikan at ogna sær silvurmerkini, tí enn er bert eitt stig upp til B36. Skal tað eydnast teimum at tryggja sær sigurin, fer tað tó at krevja bæði dugnaskap og hepni, tí í fyrsta lagi skulu toftakvinnurnar vinna sín dyst, sum er á útivølli móti KÍ, og harnæst skal B36 ikki vinna sín dyst ímóti HB.

Seinasti dysturin hetta umfarið var á Skála, har B36 vitjaði. Tað eydnaðist B36 at vinna ein trivaligan sigur, men leingi sá tó út til, at Skála skuldi geva gestunum ein veruligan hvøkk. Skála var nevnliga á odda bæði 1-0 og 2-1, men so skrædnaði, og í seinna hálvleiki kundi B36 veruliga dusa sær í málrúsinum.

Sum sagt merkir hetta eftir øllum at døma, at B36 nú fer at ogna sær silvurmerkini. Tað kann eisini væl vera, at tær hava ráð til at tapa seinasta dystin móti HB, men tað man tó neyvan vera nakað, sum tæør svørt/hvítu hugsa um, tá tað eru grannarnir, sum standa á skránni.

Úrslit um vikuskiftið

HB-KÍ 1-4 (1-1)
0-1: Rannvá Andreasen
1-1: Eyðfríð Kristiansen
1-2: Malena Jospehsen
1-3: Rannvá Andreasen
1-4: Rannvá Andreasen

GÍ-B68 0-2 (0-0)
0-1: Maibritt Olsen
0-2: Maibritt Olsen

Skála-B36 2-7 (1-1)
1-0: Poula D. Olsen
1-1: Anja Weihe
2-1: Elin Jacobsen
2-2: Ása á Neystabø
2-3: Ása á Neystabø
2-4: Ása á Neystabø
2-5: Súsanna Hansen
2-6: Arnbjørg Danielsen
2-7: Arnbjørg Danielsen

Máltindurin, kvinnur

Rannvá Andreasen	KÍ	18
Malena Josephsen	KÍ	10
Arnbjørg Danielsen	B36	7
Majbritt Olsen	B68	7
Ása á Neystabø	B36	6
Eyðfríð Kristiansen	HB	5
Elsa Maria Simonsen	KÍ	5
Vivian Bjartalíð	Kí	5
Anja Weihe	B36	4
Heidi Heinesen	GÍ	4
Elin Jacobsen	Skála	4
Laila Enghamar	B36	3
Súsanna Hansen	B36	3
Hansy Davidsen	B68	3
Poula D. Olsen	Skála	3

Støðan, 1. deild kvinnur

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	KÍ	9	9	-	0	-	0	42	7	35	30
2	B36	9	6	-	0	-	3	25	16	9	20
3	B68	9	6	-	0	-	3	17	14	3	19
4	HB	9	2	-	2	-	5	15	17	-2	8
5	GÍ	9	2	-	1	-	6	7	27	-20	7
6	Skála	9	0	-	1	-	8	12	37	-25	1